# irkini ikki eru kappingarfør



- Undir øllum vanligum umstøðum verður fiskurin hjá línubátunum altíð bjóðaður út á marknaðinum, sigur reiðarin

Mynd: Vilmund Jacobsen

sum eingin línubátur fer av landinum við óvirkaðum fiski, um hann sleppur undan at fara. Tað er so at siga bert, tá ið verkføll hava lagt virkini lamin, at siglt hevur verið av landinum við óvirkaðum fiski.

- Fiskurin hjá línubátunum verður altíð bjóðaður út á marknaðinum, sigur hann.

Torleif vísir á, at stundum verður ført fram, at gólvini á fiskavirkjunum eru turr, tí virkini fáa ikki hendur á fiskinum sum fer av landinum. Arbeiðarafeløg og politikarar eru á gosi, men lutfalsliga lítið hoyrist um, at hetta hendir, tí virkini ikki eru kappingarfør. Hví kemur tað ikki fram, so fólk kunnu skilja, at hetta er ein partur av trupulleikunum? spyr reiðarin.

## Hvør skal gjalda?

Torleif spyr eisini, um tað er fiskimaðurin, sum skal gjalda fyri at hava virkini opin.

- Og oman á alt verður í ramasta álvara tosað um at áleggja okkum eina tilfeingisrentu, leggur reiðarin aftrat.

At enda heldur Torleif Sigurðsson, reiðari, at myndugleikarnir skulu ansa rættiliga væl eftir, at alt ikki endar í einum ellibita – og ruðulleika.

---

i



*Línuskipið, Fugltúgvan, er lýst til sølu – men bara á Eiði*

Mynd: Skipalistin

# Umhugsar at keypa hinar út

**- Hinir báðir eigararnir í skipinum, bróður og bróðursonur mín, hava bjóðað mær at keypa teirra partar, men hetta havi eg ikki tikið støðu til enn, sigur Torleif Sigurðsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Torleifi Sigurðsson, reiðara, stendur nú í boði at keypa línuskipið, Pison.

Í dag eigur hann skipið saman við bróðuri sínum og einum bróðursoni.

- Teir hava bjóðað mær at keypa sínar partar, men talan er um nógvan pening, so eg havi ikki tikið endaliga støðu til tilboðið enn.

## Minkandi veiðivirði

Í 2003 setti Pison helst øll met hjá einum føroyskum línuskipi, tá ið teir fiskaðu fyri 22,4 miljónir krónur.

Í 2004 fiskaði skipið fyri 12,6 miljónir krónur, men í 2005 var samlaða veiðivirðið niðanfyri 11 miljónir krónur, sum er minni enn ein helmingur av virðinum í 2003.

Tórleif Sigurðsson er reiðari á Pison og Kvikki, umframt at hann eisini er útgerðarmaður hjá Froya, sum er fyrrverandi Jógvan S.



- Mær stendur í boði at keypa hinar báðar eigararnar út í Pison, men hetta er nógvur peningur, sigur Torleif Sigurðsson, sum eisini er reiðari á línuskipunum, Kvikki og Froya